

# SORGIN NÍVIR Á JÓLUM

Á **JÓLUM** VALDAR **GLEÐI** OG FRIÐUR, **FAMILJURNAR** HUGNA SÆR **SAMAN**, OG ØLL ERU **GLAÐ**. ELLA... ER TAÐ NÚ VERULIGA SO **EINFALT**, SUM VIT MANGAN VILJA GERA TAÐ TIL OG YNSKJA **OKKUM**? VIT HAVA TOSAÐ VIÐ FIMM **UNGFÓLK**, SUM ØLL HAVA **MIST**, OG SUM MERKJA **SORGINA** NÍVA UM **JÓLINI**

**TEKST OG LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale

## Ringa samvitsku um gleðina

TAÐ FARA **ALTÍÐ** AT VERA **TÓM** PLÁSS VIÐ **BORÐIÐ**, SERLIGA Á **JÓLUM**, TÁ **FAMILJAN** ER Í **HÁSÆTI**. MEN HÓAST TAÐ KANN VERA **SVÁRT**, SO MÁ MAN **LOYVA** SÆR SJÁLVUM AT **GLEÐAST** UTTAN RINGA **SAMVITSKU**, ERU **DØGG** HANSDÓTTIR, **ALDA** MOHR EYÐUNARDÓTTIR OG **PETUR SIGURÐ** RASMUSSEN **SAMD** UM. TEY HAVA ØLL HAVA **MIST** HVØR SÍNA **SYSTUR**

Tey trý ungfólkini, Petur Sigurð, Døgg og Alda, tykjast kanska ikki hava so nógv í felag. Men hóast tað, so er eitt tætt band, sum knýtir tey saman. Tey hava nevniliga øll mist hvør sína systur og hava verið ígjøgnum djúpa sorg. Hóast tey hava roynt at gleðst og komið víðari, so hava tey eisini øll kent ringa samvitsku av gleðini. Serliga orsakað av særandi viðmerkingunum frá øðrum.

### Ringa samvitsku

Døgg greiðir frá, at hon stutt eftir jarðarferðina fór oman í SMS við vinfólkunum. – Eg mátti út at fáa luft og hugsa um okkurt annað eina løtu. Men tá eg kom oman í SMS, var tað ein, sum steðgaði mær og spurdi, hvat eg gjørdi har, tí systir mín var akkurát deyð. Tað var forferdiligt, sigur Døgg og greiðir frá, at hon fekk sera ringa samvitsku av viðmerkingini. – Sjálvandi var eg kedd um systir mína, men man kann ikki vera kedd allatíðina.

Petur Sigurð og Alda nikka samtykkjandi, og Petur Sigurð greiðir frá, at tað ikki er neyðugt við viðmerkingum, tí eygnakøst kunnu eisini vera sera særandi.

– Stutt eftir, at Katrin Elisabet var deyð, fóru vit at keypa við mammu. Eg og lítlibeiggi mín bíðaðu í bilinum, og vit høvdu eitt telduspæl, sum var so ræðuliga stuttligt. Vit flentu og flentu, men tá sá eg, hvussu fólk, sum gingu framvið, stardu at okkum. Tey hildu nokk ikki, at tað sømdi seg, at vit flentu, tá systir okkara akkurát var deyð, greiðir Petur Sigurð frá. Hesi eygnakøstini vóru nóg mikið til, at hann kendi seg illa og fekk sera ringa samvitsku um at vera glaður.

Eisini Alda kennir støðuna aftur. – Øll grótu og grótu, líka frá hon doyði og inntil jarðarferðina. Har vóru so nógv fólk hjá okkum allatíðina, og eg helt tað vera eitt sindur strævið. So tá eg sá míni vinfólk í ervinum, var eg ordiliga glað at síggja tey, og vit fjasaðu eitt sindur. Eg helt tað vera deiligt eina løtu at hugsa um okkurt annað enn tað, at systir mín var deyð. Men eg fekk eisini ringa samvitsku av at vera glað, minnist Alda.

Tey trý eru samd um, at fólk kanska hava ilt við at skilja, hvussu fólk, sum hava mist, veruliga hava tað. Og tí hjálpir tað so sera væl at fara í sorgarbólk.

### Berin

Petur Sigurð er ikki í iva um, at sorgarbólkurin Berin hjálpti honum væl. – Eg trúði, at eg var tann einasti í verðini, sum hevði mist, men so kom eg har, og so vóru tað fleiri, sum vóru í júst somu støðu, sum eg, sigur hann, og leggur afturat, at størsta hjálpin er at tosa um tað. – Tað hjálpir væl, tí hini, sum eru har, skilja tað so væl.

– Eg helt eisini, at tað var ein lætti, at vit grótu so nógv, og at tað var ókey at gráta, heldur Døgg. – Tað hjálpir at tosa opið og erligt, og at tað eru fólk, sum tíma at lurta. Eg helt, at nógv uttanfyri Beran trektu seg aftur, tá eg tosaði um systir mína, tí tey ikki vistu, hvussu tey skuldu fyrihalda seg til tað. Men í Beranum var tað púra natturligt, tí hini vistu júst, hvat eg tosaði um.

– Og tær dugdu eisini so væl at spyrja, leggur Alda afturat. – Hóast man fór at gráta, so blivu tær við at spyrja, so man fekk alt út og setti orð á tað. Og tað gjørdi, at tað kendist lættari og lættari at tosa um tað.

### Ver opin

Tá tey trý verða biðin um at geva teimum góð ráð, ið eru um fólk, ið syrgja, so er svarið greitt: ver opin!